## Nógvar rottur í Bretlandi



Sparingar hjá teimum lokalu myndugleikunum í Bretlandi hava gjørt, at talið á rottum er vaksið sera nógv í seinastuni. BBC sigur, at tey, sum taka sær av at beina fyri rottum, hava meiri at gera nú enn í mong ár, og at tey vórðu boðsend 15 prosent fleiri ferðir í fjør enn árið fyri. Víða um Bretland spara teir kommunalu myndugleikarnir við rusksavningini, og tað hevur givið rottunum góðar umstøður. Tey, sum eru serliga ill um gongdina, siga rotturnar vera enn eina gávu frá Gordon Brown, forsætisráðharra til bretska fólkið.

## Arbeiða framvegis við Tilhaldinum

Arbeitt verður framvegis við málinum um Tilhaldið í Havn, eftir at ein áheitan kom á kommununa um at yvirtaka raksturin. Tórshavnar Kommuna hevði í gjárkvøldið boðið nevndirnar fyri Pensiónistafelagið í Havn, Tilhaldið og Eldraráðið til prát, har eldraøkið í kommununi varð viðgjørt sum heild. Eisini bað kommunan um at fáa ynskini hjá teimum eldru á borðið. - Nú eru ynskini komin á borðið, og málið koyrt til umsitingina, har so krónur og oyru verða sett á. Síðan verður tað tikið til politiska viðgerð, sigur Heðin Mortensen, sum eisini leggur afturat, at arbeitt verður í skundi við hesum málinum.

# Roc Amadour seljast á tvingsilssølu í apríl

**Skipið, sum er heimahoyrandi í Vági, hevur ikki verið til fiskiskap síðan í fjør vár, men hevur fiskiloyvi**

SØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Roc Amadour verður hin næsti djúpvatnstrolarin, sum verður seldur á tvingsilssølu innan stutta tíð. Í november varð Phoenix seldur, og henda trolaran keypti Føroya Banki*

*Mynd: Skipalistin*

**Roc Amadour**

| | |
|---|---|
| Smíðistaður/ ár: | Frakland/ 1973 |
| Longd: | 53 m |
| Breidd: | 10,80 m |
| BRT: | 708,91 |
| Maskina: | ABC Diesel/ 1994 |
| Maskinorka: | 2396 HK |
| Eigari: | P/F V-Invest |

Í bløðunum um dagarnar verður djúpvatnstrolarin Roc Amadour lýstur á tvingsilssølu, sum sambært lýsingini verður í Føroya Fútarætti 14. apríl í ár.

Tað er Óla Jákup Kristoffersen, advokatur, sum starvast hjá Advokatskrivstovuni, ið hevur umbiðið tvingsilssøluna.

Í lýsingini framgongur ikki, hvør hevur umbiðið søluna, men útgerðarmaðurin í Vági, Hallur Fríði Augustinussen, sigur, at sølan er umbiðin av Realinum.

Upplýst verður í lýsingini, at fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at verða á Dómaraskrivstovuni 24. mars, og tá verða tey, sum meta seg at hava krøv í skipinum, innkallað til fundar.

Tey, sum hava áhuga fyri skipinum, kunnu síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya Fútarætt.

Avtala kann eisini gerast við advokatin, sum hevur umbiðið tvingsilssøluna, um at síggja skipið, sum liggur í Vági.

### Eisini Phoenix

Roc Amadour er annar djúpvatnstrolarin, sum verður seldur á tvingsilssølu innan fáar mánaðir.

Hin 23. november í fjør varð Phoenix, sum P/F Reiðaravirki Phoenix á Tvøroyri átti, eisini seldur í Føroya Fútarætti.

Føroya Banki keypti djúpvatnstrolaran og er framvegis eigari av skipinum.

Hallur Fríði Augustinussen, útgerðarmaður í Vági, sigur, at Roc Amadour hevur fiskiloyvi, nú hann verður seldur.

Útgerðarmaðurin hevur annars ongar viðmerkingar til umbidnu søluna av skipinum.

# Førdi dýrastu ísfiskalastina til lands

**Roc Amadour, sum áður kallaðist Boðasteinur og var heimahoyrandi í Fuglafirði, hevur ført størstu ísfiskalast til lands, sum nakrantíð er landað í Føroyum**

SØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá vágbingar á sinnu keyptu Boðastein, sum hann tá kallaðist, frá fuglfirðingum, vóru vónirnar stórar. Tað vóru Helgi Augustinussen, vanliga róptur Hegga, og aðrir, sum keyptu Boðastein. Tá høvdu teir eisini djúpvatnstrolaran, Sancy.

Boðasteinur gjørdist kendur í føroyskari fiskiveiði sum skipið, ið dugdi at fáa burtur úr búrfiski.

Og tað var ikki smávegis av "valuta", teir førdu til lands, tá fiskiskapurin eftir hesum djúphavsfiski eydnaðist best.

Mangan verður skrivað um stórar landingar, og hvørt verða landingar sagdar at vera met – antin í nøgd ella søluvirði.

Men rættiliga vist er tað, at Boðanes, núverandi Roc Amadour, hevur ført dýrastu ísfiskalast til lands, sum nakrantíð er landað í Føroyum.

Skipið gjørdi ein lutfalsliga langan túr, og teir royndu eisini sunnarliga í Atlantarhavinum. Men tá teir landaðu lastina í Føroyum – haldi tað var á Tvøroyri – seldu teir fyri meira enn 3 miljónir krónur.

Tað er Sosialinum kunnugt dýrasta ísfiskalast, sum nakrantíð er landað í Føroyum.

Tá fuglfirðingar á sinni seldu skipið til Vágs, var Sigurd Simonsen, sum nú er borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, reiðari.

Roc Amadour er smíðaður í Dieppe í Fraklandi í 1973, men er umbygdur í 1986.

Skipið hevur eisini verið heimahoyrandi á Strondum, og tá kallaðist tað eisini Roc Amadour.

Í 1994 keyptu fuglfirðingar skipið og góvu tí navnið, Boðasteinur.